## ”Læknar í 1800-árunum”

**Í kvøld heldur Elin Súsanna Jacobsen, søgufrøðingur, fyrilestur í Býráðssalinum í Klaksvík undir heitinum “Læknar í 1800-árunum, ein embætismannastætt í menning”**

SETRIÐ Á FERÐ

Um aldaskiftið 1800 var ansurin fyri fólkaheilsuni vaksandi. Í Norðurlondum eins og aðrastaðni í Evropa vóru karmar lagdir fyri miðvísum heilsupolitikki, m.a. við at seta fleiri alment løntar læknar og ljósmøður, og tað almenna gekk á odda við at byggja sjúkrahús og skipa fyri sjúkufyribyrgjandi tiltøkum. Eisini í Føroyum varð um hetta mundið roynt at samskipa og økja tær almennu heilsutænasturnar. Landsins lækni fekk ábyrgd og myndugleika til at hava umsjón við fólkaheilsuni í víðari merking.

Í hesum fyrilestri verður evnið, hvørja ávirkan henda heilsupolitiska stevna fekk á læknatænastuna í Føroyum, á týdning læknanna í samfelagnum og menning av læknaembætum fram gjøgnum 1800-árini.

Elin Súsanna Jacobsen er lektari í søgu á Søgu- og Samfelagsdeildini. Hon hevur skrivað bókina “Slóðir í heilsuverksøguni”, sum Føroya Fróðskaparfelag gav út í fjør. Elin Súsanna fekk í 1996 Ph.D. heiti við Århus Universitet fyri ritgerðina “Rúsdrekka - siðir og ósiðir”.

Fyrilesturin er almennur og byrjar kl. 20 týskvøldið 6.desember.

**ave**



*Elin Súsanna Jacobsen*

# Eksperimenterandi listamaður

**Hann vil helst ikki líkjast øðrum málarum og sær hvønn málning sum eitt nýtt eksperiment. Ungi listamaðurin Ingi Suni Jacobsen sýnir í løtuni 11 málningar fram í Mentamálaráðnum**

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Listamaðurin Ingi Suni Jacobsen leggur eg eftir at menna sín heilt egna spontana og improviseraða stíl*

Hetta seinasta árið hevur 29 ára gamli listamaðurin Ingi Suni Jacobsen verið serliga virkin. Hann hevur longu havt fleiri frámsýningar í ár, sýnir í løtuni fram í Mentamálaráðnum og arbeiðir harumframt við enn eini framsýning, sum verður at síggja á Café Jinx fyrst í komandi ári.

### Litir og kenslur

Málningarnir hjá Inga Suna eru abstraktir og óvanliga litsterkir. Sjálvur sigur hann, at hann roynir at útrykkja vitalitet og styrki í sínum málningum, sum hann annars letur verða opnar fyri øllum tulkingum.

- Áskoðarin skal kunna leggja sínar egnar kenslur í málningarnar, tí eg vænti, at tey flestu kenna seg aftur í kenslunum, eg royni eg fáa fram, sigur Ingi Suni.

Hóast Ingi Suni viðurkennir sín íblástur frá Salvador Dali og van Gogh, leggur hann seg ikki eftir at líkjast øðrum málarum. Slíkt gevur lítla meining, heldur hann, tí tá talan er um list, verða ongir málningar eins. Heldur leggur hann seg eftir at menna sín heilt egna, eksperimenterandi stíl, har tað spontana og improviseraða sleppa at stýra gongdini.

- Hesin málihátturin hevur við sær, at eg alla tíðina royni umaftur, og at nógvir málingar fara burtur, tí teir ikki kunnu brúkast, sigur Ingi Suni.

### Frumevni

Myndevnini hjá Inga Suna taka ofta støði í teimum fýra frumevnunum: eldur, luft, vatn og jørð, men íblásturin kann koma nógva staðni frá. Til dømis var tað lagið “Suzanne” hjá Leonard Cohen, sum kveikti málningin “Sólin og basalt”. Ì lagnum hjá Cohen er tað havið og sólin, sum ganga aftur, meðan Ingi Suni hevur valt at lata basaltið geva málninginum ein føroyskan dám.

Ein av teimum meir kendu málningunum hjá Inga Suna, “Lívsins Træ” ímyndar eisini tað alfevnda og grundleggjandi. Hesin málningurin verður um ikki so langa tíð at síggja sum jólakort.

Í løtuni gongur Ingi Suni á listaskeiði, har hann serliga tekst við at blanda litir. Eisini er hann farin at royna seg við at mála við spartli fyri at geva listarliga strokinum ein lættari dám. Fleiri av málningunum, sum eru at síggja í Mentamálaráðnum eru málaðir við spartli.

Um sínar framtíðarætlanir sigur Ingi Suni, at hann áhaldandi roynir at menna seg sum málari við at mála hvønn dag.

- Dreymurin er framvegis at fáa mína egnu málistovu, har eg kann royna meg í friði og náðum. Og so sjálvandi at gerast ein viðurkendur málari, sigur Ingi Suni við einum speiskum smíli.



*Málningurin “Sólin og basalt” er kveiktur av lagnum “Suzanne” hjá Leonard Cohen*



*Ætlandi verður málningurin “Lívsins Træ” nú gjørdur til jólakort*



*“Hurðin inn til ævinleikan”*

# Stórlætisørskapur og lívsleiði

***Messias II. Synd drepur Guð* er fyrsta bókin eftir unga skaldið Elias Askham. Hann hevur áður gjørt vart við seg sum stuttsøguhøvundur, men hevur nú av álvara latið sítt fyrsta íkast til føroyska bókaútgávu.**

SKALDSØGA

Skaldsøgan er dagbók eftir Ádam Guðmundsson, eitt neyðardýr, ið líður av bæði lívsleiði og stórlætisørskapi; hann kennir seg sum fremmandan í tilveruni, og tó hevur hann sæð sannleikan aftan veruleikan: at lív okkara eru meiningsleys.

### Meistaraverkið

Hansara søga leggur fyri við tí, at hann støkkur upp úr svøvni – eftir at hava havt eina so andstyggiliga marru, at hann gerst ræðslusligin fyri sær sjálvum – og so við og við læra vit hann og hansara marrur og óttar at kenna. Men tað er ikki tað einasta – nei, hartil er hann nívdur av sorg. Tí tá hann fór undir at skriva dagbókina, hevði Eva, hansara tvíburasystir, ið hevði beint fyri sær sjálvari, longu ligið undir grønu torvu í næstan eitt hálvt ár. Men sum søgan líður, avhyljast okkum so spakuliga, hvør er atvoldin til sjálvmorðið hjá Evu, og Ádam sannkennir, hvussu hann skal bera seg at fyri at koma sær undan síni fremmandagerð: at hann noyðist at ríva sjúkuna upp við rót; við einum so andskræmiligum ilskubragdi, ið heimurin aldri hevur skoðað fyrr, skal Ádam taka burt upphavið. Sum hann sjálvur tekur til: “*Men bíða tú bara, og tú ført heiðurin av at hoyra Mítt verk; Mítt myrka og stórsligna meistaraverk, ið fer at runga í hvørjum avkróki av heiminum – og skaka hvørt mansbarn, ið her livir.*”

**ave**




*Elias Askham:* Messias II. Synd drepur Guð, *Mentunargrunnur Studentafelagsins, 2005*